

**VOLVO V40**
Árg 1999, Km 111112. Kr. 143400. Leður kombi setur, hita í forsetrum, cruisecontrol, el-spegl, el-rútar o.m.a. krók. Vælhildin.



KA923
**ROVER 400 2,0 BENSIN**
Árg 1998, Km 85275. Kr. 110600. Manuel gear, leðursetur, leðurróður, cruisecontrol, el-rútar, dubult airbag, stereoanlegg v/fløguspælara, tónaðir rútar aftan. Góð píkadekk. Vælhildin.



**VOLVO V40**
Árg 2001, Km 46000. Kr. 195000. Árgangur oktober 2001, motorstødd 2,0 146 hk, leðurkombi setur, síðuairbag í forsetrum, airbag í stólpum, gardinairbag, cruisecontrol, klimaanlegg, hita í forsetrum, fjarstýrt centrallás, alarm, startsperru, krók, tónaðir rútar aftan, antispin system/ESP, 3 punkts trygdarbelti í miðjuni aftan, xenon forlyktir, o.m.a. Informatiónscentur. Vælhildin.



**TOYOTA LANDCRUISER**
Árg 1998, Km 112200. Kr. 197000. Vøruvognur. El-rútar, anlegg v/fløguspælara, krókur, heilársdekk á lættmetalfelgum. Setur til aftan fylgja við. Vælhildin



**SSANGYONG MUSSO**
Árg 2005. Nýggjur Pick-up 4x4WD, centrallás, el-rútar, aircondition, plastinnsats í last. Prísur pers. bil 271.000 kr v/mvg - vørubilur 213.000 kr v/mvg .



**OPEL VECTRA**
Árg 2001, Km 32102. Kr. 145800. Fjarstýrt centrallás, multifunktiónsróður, tónaðir rútar, aircondition, elrútar framman, orig. opel radio. Píkadekk á felgum og summardekk á felgum fylgja við. Vælhildin.



**MITSUBISHI GALANT**
Árg 1989, Km 158851. Kr. 15000. Radio, nýumvældur m.a. útstoyt. Nýsýnaður. Vælhildin.



**NISSAN ALMERA**
Árg 2002, Km 26000. Kr. 125000. 5 hurðar, aircondition, el-rútar framman, el-spegl, hita í setrum. Panasonic anlegg við fløguspælara. Vælhildin.



**PEUGEOT 106 1.5D 3H**
Árg 2002, Km 78000. Kr. 78000. Fjarstýrt centrallás, el-rútar, krók. Vælhildin.



**BMW 1,9 TDS 2 HUR_AR**
Árg 1999, Km 130000. Kr. 145000. BMW 1,9 TDS, 2 hurðar, svart metallak, manuel gear, el-rútar, Sony anlegg v/fløgu, tracktioncontrol, 17'' lættmetalfelgur við nýggjum dekkum. Vælhildin.



**OPEL VECTRA**
Árg 2001, Km 46045. Kr. 143500. Takboylar, bagaguskjúlara, aircondition, teldudisplay, originalt Opel radio. Vælhildin.



**KIA CLARUS**
Árg 1997, Km 125000. Kr. 79000, el-rútar framman, fjarstýrt centrallás, Pioneeer anlegg við fløgu, sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við. Vælhildin

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com


# Aðalfundur hjá Føroya Ellisakførum



*Heini á Borg, formaður í Føroya Ellisakførum framman fyri ellisbilafylgi á veg til Kirkjubøar summarið 2004. Felagið skipar regluliga fyri hugnaligum útferðum við ellisakførum*

Leygardagin komandi, 19. mars kl 16 hava Føroya Ellisakfør ársaðalfund í felagshølunum yviri við Strond í Havn.

Føroya Ellisakfør er áhugafelga hjá teimum, ið hava alsk til gamlar bilar og motorsúkklur. 164 limir eru í felagnum, sum varð stovnað 4. februar í 1992.

Endamálið hjá felagnum er at varðveita ellisakfør í uppruna sniði, at veita limum hjálp og vegleiðing, at skapa limunum góðar umstøður at varðveita ellisakfør og at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu nøra um virksemi felagsins.

Bilasøgan í Føroyum er ikki so víðfevnd – fyrsti bilurin kom til landið tann 6. mai í 1922, so tað eru enn fólk, sum minnast bilafríu Føroyar. Føroya Ellisakfør er í ferð við at savna saman tilfar til eina bók, sum skal lýsa føroysku bilasøguna.

Til tess at bøta um viðurskiftini hjá teimum, sum hava ellisakfør, hevur Føroya Ellisakfør sett í stand gamla vatnbrunnin undir Gráasteini í Havn, sum felagið leigar frá Tórshavnar Kommunu. Brunnurin er nú ein 750 fermetra stór høll, sum hýsir hópin av ellisakførum. Ein avfuktingarskipan er sett upp í høllini, at at vætuinnihaldið í luftini liggur á 57%, sum er markið, har øll tering í metalli steðgar. Sostatt er tað eydnast felagnum at skapa umstøður, at ellisakfør kunnu hýsast undir tryggum umstøðum. Hetta er ein avgjørd fortreyt.

Verkætlanin við brunninum hjá Føroya Ellisakførum fevnir eisini víðar, tí felagið hevur í umbúna at seta á stovn eitt tøkniligt fornminnissavn at lýsa tekniskú tilgongda í 20. øld - við serligum atliti til bilar og motorsúkklur.

Í nevndini hjá Føroya Ellisakførum sita: Heini á Borg, formaður, John William Old, næstformaður, Eirikur Lindenskov, skrivari, Hans Jørn Nielsen, kassameistari, Petur Johannessen, nevndarlimur

Tveir limir standa fyri vali á aðalfundinum. Heini á Borg og Hans Jørn Nielsen bera seg undan afturvali.

Aðalfundurin verður í hølum felagsins kl 16. Eftir aðalfundin verður ábit við onkrum at leska sær við. Fyri aðalfundin - kl 15, verður høvi at síggja brunnin undir Gráasteini og kunna seg um viðurskiftini har.


**TIL SØLU**



MAZDA 2500 LASTBILUR
REYÐUR VIÐ TRÆLAST
ÁRG. 1998 · KM. 98000
**TEL 370 368 - BEST EFTIR KL. 19.00**






**MERCEDES BENZ 200 D ÁRG. 1966**
Árg 1966, Hetta snotuliga ellisakfar, sum er í góðum standi, er til sølu. Bilurin er høvuðsumvældur og sproytlakkeraður fyri uml. tveimum árum síðani. Sum ellisakfar rindar hann ongan vegskatt og sera lítið í trygging.. Kr. 40.000.
**Tel 216409. ellis@post.olivant.fo**



www.filadelfia.fo

**Evangelisktmøti**

v/Heina Lützen
Sunnukvøldið 20. mars, kl.18.00 á Landavegi 22



Filadelfia
HVÍTUSUNNUSAMKOMA